

# Leiðari til Dagstovnin á Argjum

**Søkt verður eftir leiðara til Dagstovnin á Argjum at seta 1. oktober 2010 ella skjótast til ber.**

Dagstovnurin er sjálvsognarstovnur við fimmmannanevnd, men verður kommunalur stovnur frá 1. januar 2011. Bæði nú og í umleggingini tørvar okkum fólk við áræði til spennandi og mennandi starv.

Dagstovnurin á Argjum vil vera eitt trygt stað, har børn fáa góðar fyrimyndir og mennast saman við starvsfólkunum og læra ábyrgd í felagsskapi. Stovnurin er skipaður við umleið 80 børnum í vøggustovu, barnagarði og forskúlabólki.

**Vit leggja dent á**

- at sýna opinleika fyri foreldrum og starvsfólki
- at bjóða starvsfólki fakliga menning
- at geva øllum ábyrgd
- at sýna virðing og skapa trivnað
- at menna og bjóða av
- at byggja á spælið, bæði inni og úti
- at bjóða bæði vøggustovu, barnagarð og forskúlabólk

**Vit bjóða tær**

- starv við ávirkan og avbjóðing
- starv, ið krevur álit og sjálvstøðugt arbeiði
- starv, har tú nýtir dygdir og mennist

**Tú bjóðar okkum**

- námsfrøðiliga útbúgving
- leiðsluroyndir og møguliga leiðsluútbúgving ella eftirútbúgving
- dirvi og visiónir
- fakliga vitan
- samskiftisevni
- framfýsni og hug at halda fram við søgu og menning stovnsins
- virðing fyri ymiskleika
- hollan kunnleika til teldu
- kunnleika til roknskap

**Setanartreytir**

Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, deildarleiðara á Barna- og ungdómsdeildini hjá Tórshavnar kommunu, tel. 302010 / 214032, ella Sølvu Heinesen, næstformann í nevndini, tel. 506725.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 2. august 2010** og skulu stílast til:

Dagstovnurin á Argjum
c/o Tórshavnar kommuna
Vaglið 1
100 Tórshavn
Att.: Katrin Petersen

SENDISTOVAN

almannastovan HTM HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN

## AVGREIÐSLUTÍÐIR Í SUMMAR



**12. juli til 16. august 2010** eru avgreiðslutíðir okkara broyttar. Móttøkurnar hava opið og telefonirnar verða tiknar:

**mán - frí: kl. 10 - 12.**

**Frá mánadegnum 16. august 2010** verða allar deildir aftur opnar sum vanligt:

**mán - hós: kl. 10 - 14.**
**frí: kl. 10 - 12.**

Sí annars www.almannastovan.fo

KREA - TEL 60 80 80

Bilradio (e) Leygardagin kl. 17

BILRADIO

Aktuel bilíðindi við Maggi Gunnarsson



Ingi Gunnarsson, stigtakari til minningardag teirra deyðu í ferðsluni

Í sendingini Bilradio á Rás2, sum verður endursend leygardagin kl. 17, verður nógv gjørt burturúr minningardegi teirra deyðu í ferðsluni. Samrøður eru við Sølva R. Hansen frá Ferðslutrygd og Inga Gunnarsson stigtakara til minningardagin. Eisini verður ein samrøða endursend við Leon Heinesen, fyrrverandi vitapassara, sum vann ein bil, tá hann var vitapassari í Mykineshólmi.

Sendingin kann eisini hoyrast sunnudagin kl. 15.